SOSIALURIN telf. 1 18 20, box 76, 3800 Tórshavn,
Útgevari: Føroya Javnaðarflokkur
Ábyrgdarblaðstjóri: Vilhelm Johannesen, tlf. 5 58 73
Seting og pasteup: Prentsmiðjan á Heygsbreyt
Repro og offsetprent: Prentsmiðja Dimmalættingar

LANDSFUNDUR

LANDSFUNDUR javnaðarfloksins byrjar í dag og heldur áfram leygardagin og sunnudagin.

Í FYRSTA LAGI verður landsfundurin sjálvandi at velja ta floksstjórn, herundir floksformann, næstformenn, skrivarar og uttantinga limir í floksleiðsluna, sum komandi tvey árini, fram til næsta landsfund, skal stjórna flokkinum.

Í ØÐRUM LAGI verður tann politikkur, sum rikin er seinastu fýra árini, viðgjørdur. Framd eru nógv týðandi mál. Millum hesi, eru eisini fleiri av teim málum, sum javnaðarflokkurin hevur havt í stevnuskrá sini. Men sterri týdning í hesum sambandi, hava sjálvsagt tey mál og tann parturin av stevnuskránni, sum ikki hevur vunnið frama. Tað eru hesi mál, javnaðarfólk eiga at standa saman um og sjálvandi verður landsfundurin at leggja mikla áherðslu á at fáa hesi mál framd.

TÓ STENDUR OKKUM greitt, at umstøður ikki hava verið og framvegis ikki eru, til at fremja stevnuskrá floksins sum heild. Veljararnir seta okkum treytirnar og hava tær ikki verið øðrvísi enn tað, at neyðugt hevur verið at arbeitt saman við øðrum flokkum.

Í TRIÐJA LAGI verður neyðugt at føra stevnuskrá floksins ajour. Sum nevnt eru partar av stevnuskránni framdir, men um somu tíð hava nýggir spurningar tikið seg upp — spuningar, sum stevnuskrá floksins møguliga skal umfata og taka støðu til.

AÐALMÁLSETTNINGUR javnaðarfloksins er at seta sterkar stuðlar undir føroyska samfelagið, at skipa so fyri, at hendan styrki kem ur øllum borgarum samfelagsins ájavnt til góðar, at broyta samfelagsgongulagið og at beina føroyska samfelagið inn á ta demokratisku sosialistisku leiðina.

LANDSFUNDUR javnaðarfloksins verður fyrst og mest av øllum at staðfesta henda aðalmálsetning í stevnuskrá floksins og at áleggja floksins umboðsmonnum, mest møguligt at ávirka landsins politikk á ein slíkan hátt, at landsins politiska kós verður løgd nærri og nærri hesi leið.

BLAÐETIKKUR

FÓLK VÓRÐU ógvuliga uppskakaði av teimum tíðindum, sum bórust sunnan úr Keypmannahavn, har sagt varð frá føroyskari gentu, ið hevði latið lív av drápsmanna ávum. Men fólk vórðu enn meira uppskakaði av, hvussu føroysk bløð, fyrr í vikuni, umfórust hesi tíðindi.

BLØÐINI HØVDU hesi tíðindi frá tíðindastovunum Ritzau og AP. Hesar, eins og aðrar tíðndastovur, senda allar upplýsingar út í slíkum føri, men tíðindastovurnar rokna ikki við hálv- og heilsovandi blaðstjórnum og eru ikki daddur fyri slíkar blaðstjórnir.

TAÐ ER skylda hjá eini og hvørjari blaðstjórn, kritiskt at meta um teir upplýsingar, sum latnir verða blaðnum. Tí eiga blaðstjórnirnar — eisini tá tíðindini koma á fjarskrivarum frá útlendskum tíðindastovum — at meta um dygdina í upplýsingunum, at meta um hvat hevur týdning sum tíðindi, hvat er sømuligt og hvat er ósømuligt — ja, meta um hvat kann setast uppá prent.

SUM DØMI kann nevnast, at allur lesturin um fortíðina hjá henni, sum rakt varð av vanlukkuni, als ongan týdning hevur í hesum sambandi. Og tað sum verri er. Bløðini bera tíðindi um tað, sum hent var áðrenn sjálva vanlukkuna, og tann sum givið hevur hesar upplýsingar er sjálvur drápsmaðurin. Hesir upplýsingar ákæra fyri ein part hana sum lat lív. Men hvør sigur at teir eru beinir? Ein drápsmaður hevur slongt teir av munni og hon sum lat lív hevur ongan møguleika fyri at dementera hesi tíðindi.

TÍÐINDASTOVURNAR eru at javnmeta við hann, ið selur ótilvirkaði klæði, meðan blaðstjórnirnar megu metast við skræddaran ella seymirskuna, sum skulu skera klæðini til og seyma tey, áðrenn farast kann í tey.

TAÐ, AT TAKA tíðindir frá einum fjarskrivara og lata tey prenta sum tey eru, er tað sama sum at lata seg í klæðir, sum hvørki eru skorin ella seymaði — og soleiðis komu føroysk bløð út á geilar seinasta týsdag.

FØROYA BANKI
banki FØROYA




TØKK

Øllum tykkum, sum á einhvønn hátt mintust til okkara á gullbrúdleypsdegnum 7.2., veita vit okkara hjartans tøkk.

Birita og Edvard Lindenskov.

HUSMOR VINDUET



Góðska í hvørjum einstøkum luti.

Kann læsast í tveimum ymiskum støðum (barnatrygd og vaskistøða).

Kann koppast 180 gradir uttan at tað kemur inn í rúmið — gongur sostatt frítt av urtapottum og gardinum.

Umboð fyri Nanset Trevarefabrikk

SVEND KROSSTEIN
tlf. 14600

Ráfiskaprísir

Ráfiskanevndin, sum sett er eftir løgtingslóg nr. 21 frá 8. mai 1969, hevur á fundi 22. febr. 1974 ásett hesar minstuprísir fyri fyrstafloks blóðgaðan ráfisk kruvdur við høvdi frá vekt.

Toskur	yvir 70 cm	kr. 2,86 pr. kg
—	44—70 cm	kr. 2,69 „ „
—	34—44 cm	kr. 1.00 „ „
Hýsa	yvir 40 cm	kr. 2,95 „ „
Longa		kr. 2,70 „ „
Blálonga		ongan prís
Brosma	yvir 52 cm	kr. 1,89 „ „
Skøta		kr. 0,80 „ „
Kongafiskur		kr. 0,86 „ „
Upsi		kr. 1,65 „ „
Hvítingur	yvir 31 cm	kr. 2,15 „ „
Havtaska	yvir 3 kg	kr. 1,63 „ „
Kalvi	undir 1 kg	ongan prís
—	1— 4 kg	kr. 5,19 „ „
—	4—60 kg	kr. 7,70 „ „
—	yvir 60 kg	kr. 7,18 „ „

Hesir prísir eru galdandi frá og við 23. febr. 1974, sum omanfyri tilskilað á hesum plássum:

Klaksvík, Hvannasund, Norðdepli, Lorvik, Fuglafirði, Eiði, Gøtu, Skálatirði, Nólsoy, Tórshavn, Vestmanna, Miðvági, Sørvági, Tvøroyri og Vági.

Fyri tey avreiðingarpláss, sum eru ikki nevnd her, verður prísurin hin sami, sum í omanfyri nevndu plássum við frádrátti av flutningskostnaði til og frá avskipingarhavn.

Tórshavn, 23. februar 1974.

Prísásetingarnevndin á ráfiski

Landsfundur

Føroya Javnaðarfloks verður í húsum Havnar Arbeiðsmannafelags 1., 2. og 3. mars

Fundurin verður settur fríggjakvøldið 1. mars kl. 19,30

Leygarkvøldið kl. 20 verður veitsla í Havnar Klubba. Atgongugjald 50 kr.

Tekningarlisti liggur á tlf. 11820. Seinasta freist at tekna luttøku er fríggjadagin kl. 12

JAVNAÐARFLOKKURIN

Vit hava altíð á goymslu alt tilfar til

blikksmíð
sanitet
hitaverk
ventilatión

P/F demich

Verður sent um alt landið

Tlf. 1 1071 . Tórshavn